# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
Eirikur Lindenskov
post@sosialurin.fo
tlf 341800

*Eru dagstovnar til fyri børnini ella eru børnini til fyri dagstovnarnar?* *Margreta Dam, Argir*

## Merkisdagur – merkismaður

Leygardagin varð nýggja listasavnið á Sandi tikið í brúk við eini samkomu fyri innbodnum og dagin eftir vóru dyrnar latnar upp fyri almenninginum. Eitt prýðiligt hús og eitt byggilistarligt avrik. Dagurin var ein merkisdagur fyri Sandsbygd og fyri alla Sandoynna. Sandur fekk eitt listasavn við nøkrum av mæstastu føroysku lisaverkunum til gávus. Hetta var dagur, sum seint verður gloymdur á Sandi, í Sandoynni og í øllum Føroyum. Tað er jú ikki á hvørjum degi, at slík stórfingin gáva verður latin.

Sum leygardagurin var merkisdagur, so er gevarin, Sofus Olsen, sannur merkismaður. Væl lærdur, dugnaligur vinnulívsmaður, politiskt virkin frá ungum árum í Tjóðveldisflokkinum, listkønur sum fáur og listasavnari um ein háls. Hann kundi havt valt aðrar loysnir – hann valdi ta stórfingnu og ósjálvsøknu loysnina. Við at geva myndir sínar til eitt listasavn í heimbygdini hevur Sofus Olsen tryggjað sær, at myndirnar verða savnaðar á einum stað fyri alla tíð. Hetta er stórt hugsað og stórt avrikað. Sofus hevur sum kunnugt ikki bara latið myndirnar, men hann hevur eisini latið sjálvi savnshúsini smíðja av góðum handverkarum, so her er rívan tikið til. Fyri hetta eigur Sofus ongantíð at verða gloymdur, men mintur sum tann sanni hugsjónarmaður, ið hann er. Sum kunnugt var Sofus Olsen tilnevndur ársins maður av Miðlahúsinum – vit kundu valla havt valt betri.

Sandingar kunnu fegnast og vera erpnir av bygdamanni sínum. Listasavnið fer at hava ómetaliga stóran mentanarligan og vinnuligan týdning fyri bygdina. Listaverkini verða varðveitt undir tryggum umstøðum og kunnu so hanga har til mikla gleði og mikið gagn fyri núlivandi og fyri komandi ættarlið. Á savninum hava vinir Sofusar sett bringumynd av Sofusi, sum Hans Pauli Olsen hevur gjørt. Hetta er gott tiltak og skal henda mynd minna núlivandi og komandi ættarlið á henda sjáldsama mann, sum gav síni heimbygd stórfingna og almentgagnliga gávu.

**Sosialurin**

## Vóna at umsóknin verður gingin á møti

**HERGERÐ JOENSEN**
form. Vegna Vistarheimsnevndina



**Nevndin fyri Norðoya Ellis- & Vistarheim hevur nú sent Hans Paula Strøm eina áheitan um at taka málið uppaftur, tí kravið frá teimum, um at kommunurnar skulu vera við í fíggingini, er nú uppfylt og er viðlagt áheitanini**

Fyrst vil vistarheimsnevndin takka meirilutanum í Klaksvíkar Býráð, sum atkvøddi fyri umsóknini frá N. Ellis- & Vistarheimi, har vit søktu um stuðul til útbygging og umbygging av heiminum.

N. Ellis- & Vistarheim er ein sjálvsognarstovnur, sum er fíggjaður av landinum, og tað hevur verið soleiðis, at vit hava kunnað tikið lán til umbyggingar, men nú er tað ikki loyvt meira (eftir at heimið er lagt undir Serstovnaøkið hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum).

Tísendi vistarheimsnevndin eina umsókn til Hans Paula Strøm, sum varðar av økinum, har vit søktu um fígging til útbygging og umbygging av verandi húsi. Viðlagt var ein strikumynd, sum vísti, at ætlanin var at byggja ein bygning norðan fyri verandi heim, har kjallarin skuldi brúkast til goymslurúm, køk, fýr- og vaskirúm, soleiðis at meira fekst burtur úr niðastu hædd í verandi bygningi til gagns fyri búfólk og starvsfólk.

Á fyrstu hædd vóru teknað seks búrúm, sum hava ta kravdu støddina: umleið 26 fermetrar hvørt. Okkara tanki var at brúka 4 búrúm til føst pláss og 2 til umlætting, hetta hevði lætt nakað um akutta tørvin á røktarplássum.

Men vit fingu noktandi svar. Grundgevingin var tann, at tá ið kommunurnar ikki vóru við í fíggingini, so var onki grundarlag fyri at byggja, tí vit sluppu ikki at taka lán.

Síðani hevur Kl. kommuna játtað ein stuðul uppá 2,5 mill, og nakrar av hinum kommununum hava eisini verið positivar.

Tí var tað eitt vónbrot at lesa tað, sum Eyðgunn Samuelsen, sum sjálv er í einum stuðulsbólki fyri eldri í Klaksvík, skrivar. Hon sigur, at Kl. Kommuna onga ábyrgd hevur av Vistarheiminum, tí tað er ein sjálvsognarstovnur. Eg veit ikki, hvat Eyðgunn hugsar fyri sær, vit søktu um stuðul, og so vítt eg veit, so hevur Kl. Kommuna ábyrgd av øllum borgarunum í kommununi, EISINI TEIMUM ELDRI OG ÓHJÁLPNU, sum ikki eru á einum almennum stovni.

Eisini Gunnvá við Keldu førir fram, at tað skal gerast ein heildarloysn fyri alt eldraøkið, nær í framtíðini verður hettar veruleiki? Tað, sum vit hava brúk fyri, er ein loysn fyri verandi heim, so tað kann gerast meira liviligt fyri bæði búfólk og røktarfólk. Tað er átrokandi, og má gerast nú.

Hava áðurnevndu verið inni á N. Ellis & Vistarheimi og hugt? Har eru 11 búfólk, og fleiri brúka koyristól. Tað er onki uppihaldsrúm, men ein lítil matarstova sum eisini er uppihaldsstova, so tørvurin á plássi er stórur.

Gunnvá sigur, at Vistarheimið er ein perla, tað kann gott vera, men tað er eisini tørvur at halda eina perlu viðlíka, og at økið er ein fragd fyri eygað, sum onnur hava sagt, passar eisini, men tað hjálpir ikki upp á støðuna hjá teimum, sum búgva har, tey hava meira tørv á plássi inni í húsinum enn uttanfyri.

Vistarheimsnevndin hevur nú sent Hans Paula Strøm eina áheitan um at taka hetta mál uppaftur, tí kravið frá teimum, um at kommunurnar skulu vera við í fíggingini, er nú uppfylt og er viðlagt áheitanini.

Vónandi verður hendan umsókn gingin okkum á møti, so vit kunnu fara undir at prosjektera út- og umbyggingina beinanvegin.

## Hvør er til fyri hvønn?

**MARGRETA DAM**
Argir

Eru dagstovnarnir/røktarnir til fyri børnini ella eru børnini til fyri dagstovnarnar/røktararnar?

Eg var eitt ørindi á einari skrivstovu fríggjadagin. Eitt 5-6 ára gamalt barn sat og spældi game-boy.

»Ráðleggingardagur« segði skrivstovudaman umberandi.

Eg eri so fegin um, at synirnir ganga á einum stovni, ið hevur skilt tað rætt.

Hann er til fyri børnini.

- Starvsfólkið leggur ráð uttan fyri mína arbeiðstíð!

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.